# Ein heilsa undan **ovastevnuni**

Tað ber als ikki til at tosa um ovastevnuna, uttan at nevna tað megnar avrik, sum Ovi Joensen gjørdi. Hansara ágrýtni er samstundis eitt gott dømi um, hvussu ágrýtnir og eldhugaðir nólsoyingar eru, tá teir veruliga seta sær nakað fyri. Tí ovastevnan er vorðin eitt av størstu stevnutiltøkunum í Føroyum yvirhøvur.

Ovastevnan er samstundis eins og festivalarnir og stóru summarstevnurnar vorðið nakað, sum hópur av fólki bara halda vera eina sjálvfylgju at luttaka í. Tað virkisfýsni, sum liggur til grund undir ovastevnuni, er á mangan hátt vorðið ein fyrimynd fyri onnur, tí nólsoyingar prógva veruliga, at bara mann stendur saman, so ber alt til.

Tórshavnar kommuna ásannar eisini, at tað finst eitt virkisfýsni í oynni, sum krevur ávísar karmar og ávísar umstøður. Tí eru vit í holt við at gera atløgubryggju til Ternuna og tí prioritera vit útstykkingar í oynni. Onnur atlit verða tikin sum úrslit av regluligum arbeiði í nevndum og borgarafundum.

Ovastevnan hesaferð er størri og meira umfatandi enn nakrantíð við tiltøkum fyri øll. Nógv familjuvinarlig tiltøk eru og ikki minst gleða vit okkum til stóru tiltøkini sum svimjingina um Nólsoyarfjørð og regattaina. Hugaligt at síggja, at eisini á hesum økinum er hugsað um trygd og um pláss til vitjandi, annaðhvørt tey eru í báti ella fara á kamping.

Vegna Tórshavnar kommunu fari eg at ynskja øllum eina góða ovastevnu og teimum avbera mongu fyrireikarunum góða eydnu við tiltakinum í vón um, at tá vit næsta ár halda 25 ára dagin fyri bragdi Ova Joensens, eisini kunnu endaliga staðfesta, at dreymur hansara, sum gjørdist upprunaliga grundarlagið undir ovastevnuni, skjótt gerst veruleiki.

**Góða stevnu!**

***Bogi Andreasen***
*virkandi borgarstjóri*



Tórshavnar kommuna

# SKRÁIN FYRI OVASTEVNUNA 2010

## FRÍGGJADAGIN 13. AUGUST

**13:30** Heimavirkið letur upp (opið er til kl. 16.30)
**17:00** Barnarenning byrjar á træbrúnni.
**17:15** Renning niðan á Oyggjarmúla byrjar á træbrúnni.
**19:00** Matsøla í tjaldinum á keiini (tjaldið er opið til kl. 04).
**19:00** Ølsøla í tjaldinum á keiini (ølsølan letur aftur kl. 04).
**19:00** Kabaret í Royndarhúsinum (barnasýning).
(Atgongumerki á 50 kr. fyri børn 14 ár og yngri).
**21:00** Kabaret í Royndarhúsinum. (atgongumerki á 100 kr.).

## LEYGARDAGIN 14. AUGUST

**08:30** Svimjararnir leypa á bláman yviri við Strond.
**10:00** Kunningarstovan letur upp (opið er til kl. 02)
**11:00** Heimavirkið letur upp (opið er til kl. 13).
**14:00** Marin Katrina Frýdal, býráðslimur, setur stevnuna undir Mikkjalsveggi.
**14:00** Matsøla í tjaldinum á keiini (tjaldið er opið til kl. 04).
**14:00** Ølsøla í tjaldinum á keiini (ølsølan letur aftur kl. 04).
**14:30** Marinn Katrina Frýdal, býráðslimur, handar svimjarunum steyp undir Mikkjalsveggi.
**15:00** Breyðsøla á Kaffistovuni.
**15:00** (Uml. kl. 15) koma regattasiglararnir til Nólsoyar.
**15:00** Rulliboltur.
**15:00** Klatring við fótbóltsvøllin.
**15:00** Sølubásar og tivoli lata upp úti á Veg.
**15:00** Diana Victoria verður sýnd fram á Kunningarstovuni.
**15:00** Pylsuvognurin letur upp úti á Veg.
**15:00** Pannikakuvognurin letur upp úti á veg.
**15:00** Gomlu húsini við Brunn verða sýnd fram til kl. 17, (30,- kr).
**15:00** Kvinnufótbóltsdystur fyri oldgirls millum B36 og AB.
**16:00** Fótbóltsdystur millum tónleikarar "undir 30 ár" og "yvir 30 ár". Dansigentir dansa í hálvleikinum.
**16:00** Smábatar í hyli úti á Veg (opið er til kl. 21).
**16:00** Loppumarknaður í Avhaldshúsinum (opið er til kl. 19).
**17:00** Gongutúrur fyri børn út í prinsessutoftirnar, har søgan um prinsessuna verður søgd (fari verður frá Kunningarstovuni).
**17:30** Rennistrongur.
**19:00** Kabaret í Royndarhúsinum (atgongumerki á 100 kr.).
**19:00** Útimøti við Frelsunarherinum verður undir Mikkjalsveggi
**20:00** Heimavirkið letur upp.
**23:00** Felagssangur undir Mikkjalsveggi. Fýrverk eftir sangin!
**24:00** Jens Marni spælir til dans úti á Klivum. Atgongumerki 150 kr. Ølsøla er í hølinum.
**24:00** Rozac spæla til dans í Royndarhúsinum (18 ára aldurmark). Atgongumerki 150 kr. Ølsøla er í Royndarhúsinum.

## SUNNUDAGIN 15. AUGUST

**12:00** Guðstænasta – v/Sverra Steinhólm.
**13:00** Kunningarstovan letur upp (opið er til kl. 17)
**15:00** Sølubásar og tivoli lata upp úti á Veg.
**15:00** Pylsuvognurin letur upp úti á Veg.
**15:00** Matsøla í tjaldinum á keiini (tjaldið er opið til kl. 00).
**15:00** Ølsøla í tjaldinum á keiini (ølsølan letur aftur kl. 00).
**15:00** Pannikakuvognurin letur upp úti á veg.
**15:00** Rennistrongur.
**15:00** Rulliboltur.
**15:00** Klatring við fótbóltsvøllin.
**15:00** Diana Victoria verður sýnd fram á Kunningarstovuni.
**15:00** Heimavirkið letur upp
**15:00** Breyðsøla á Kaffistovuni.
**16:00** Loppumarknaður í Avhaldshúsinum.
**20:00** Kabarettin í Royndarhúsinum (atgongumerki á 100 kr.).

## MÁNADAGIN 16. AUGUST

**20:00** Kabaret í Royndarhúsinum (atgongumerki á 100 kr).

**GLASFLØSKUR ERU BANNAÐAR Á DANSISTØÐUNUM!**